B36 – EB/Streymur 5-1 (3-0):

# B36 trýstir GÍ

**Við sigrinum á EB/-Streymi legði B36 veruligt trýst á oddaliðið GÍ. Sigurin var uppiborin og ongantíð veruliga í vanda. Heimaliðið var frammanfyri við trimum málum við steðgin, og tá var dysturin at kalla av**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Árstalsfelagið úr Havn hevur nú sett fulla ferð á allar motorarnar, og málið er Føroyameistaraheitið. Hesum fekst sjón fyri søgn, tá EB/Streymur var í Gundadali og vitjaði leygardagin. Heimaliðið vann sannførandi 5-1, men ta einu løtuna í seinna hálvleiki bitu uppflytararnir tó frá sær.

### B36 brúkti høvdið

Frá byrjan av royndi B36 at leggja trýst á málið hjá Gunnari á Steig og hevði fleiri naskar atsóknir í fyrra hálvleiki.

Tvey tey fyrstu málini komu eftir hornaspørk, sum Jákup á Borg sendi innfyri. Fyrsta málinum stóð John Petersen fyri eftir seytjan minuttir, tá hann fekk høvdið á eitt hornaspark úr høgru frá Jákupi á Borg. John setti hegnisliga høvdið á bóltin, sum smeyg sær innum handaru stong.

Seinna málið høvdaði Jens Kristian Hansen, ið nú hevur skotið mál í trimum dystum á rað. Jens Kristian, sum nú aftur er við á landsliðnum eftir skaða, var hægstur inni í málteiginum, og hann skuldi bara seta høvdið á bóltin.

2-0 til heimaliðið, og tey flestu høvdu ta kenslu, at dysturin nærum var avgjørdur. Tá hálvur tími varð leiktur, økti Heðin á Lakjuni til 3-0. EB/Streymur missir bóltin á miðjum vølli, og B36 fer í skjótálop. Klæmint Matras søkir út í høgra borð, og hann leggur innfyri til ein púra leysan Heðin, sum lættliga kann økja til 3-0.

EB/Streymur hevði tríggjar verjuleikarar frammanfyri aftasta mannin, ið var Ólavur Poulsen, og teir skuldu bremsa teimum trimum áleyparunum Heðini og Magna á Lakjuni og John Petersen. Verjan megnaði ongantíð veruliga at fáa tak á teimum trimum, og tað er eisini ein torfør uppgáva. Megnaravrikið móti GÍ í seinastu viku varð ikki endurtikið á hesum sinni.

Hóast útiliðið hevði tað ógvuliga torført í Gundadali, so høvdu teir tann fyrsta góða málmøguleikan í dystinum. Vandamikli framherjin Sorin Anghel vísti seg enn einaferð at vera størsta hóttanin móti málinum.

Hann breyt ígjøgnum í høgru síðu og við at sneiða tveir hegnisliga av, var hann brádliga í skotstøðu. Tróndur Vatnhamar í málinum las tó skotið hjá rumenanum av og bjargaði við nærmaru stong. Hin málmøguleikin stóðst, eftir at Tróndur Vatnhamar hevði hildið bóltinum ov leingi, og tað gav eitt óbeinleiðis fríspark til EB/Streym. Bólturin var trillaður til Ronnie Samuelsen, men múrurin vardi fyri.


*At John Petersen hevur funnið stórspælið framaftur verður óivað avgerandi fyri, um B36 kann vinna meistaraheitið aftur*

### EB/Streymur legði hart út

Eftir steðgin vóru leiklutirnir umbýttir. EB/Streymur legði varsemi á hillina, og herjaði á B36-málið. Teir høvdu einki at missa, meðan B36 kanska hevði tikið fótin av spitaranum og var í tómgongd.

Einki vildi bera til hjá heimaliðnum ta fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, meðan EB/Streymur leyp á. Eftir einar fimm minuttir minkar Sorin Anghel um munin eftir ein álvarsaman "Jesper" frá B36-verjuni.

Bjarni Prior, sum avloysti Egil Zachariassen, skuldi spæla tvørturum, men varnaðist ikki Sorin Anghel, sum var skjótur á tí heldur veiku sendingini. Hann langaði til fyrstu ferð, og bóltur sat. Tróndur stóð sum nelgdur.

EB/Streymur fekk nú blóð á tonna, og royndi at leggja trýst á B36-málið, men tað gjørdist ongantíð veruliga vandamikið. Tað nærmasta var eitt fríspark frá rumenanum, sum fór omanfyri.

Hetta fekk venjaran hjá B36 at fremja nakrar broytingar. Jens Kristian Hansen var fluttur av vinstra vongverja aftur í verjuna fyri at fáa tamarhald á støðuni. Bjarni Prior varð avloystur av Nielsi Joensen, sum fór á høgra vongbakk, Jákup á Borg fór niðan álopið, og Heðin á Lakjuni fór á vinstra vongbakk, har Jens Kristian hevði verið, so at puslispælið skuldi ganga upp.

B36 svaraði aftur tá einir tjúgu minuttir restaðu. Magni á Lakjuni varð spældur púra leysur, og hann sendi framvið tí framstormandi Gunnari á Steig til 4-1, og so tók B36 yvir aftur. Tað, sum eftir var av dystinum, hevði B36 fleiri naskar royndir og kundi fingið fleiri mál.

Seinasta málið skeyt hann, sum setti hol á, John Petersen. Innskifti Heini í Skorini longdi eina sending frá Jens Kristiani við høvdinum fram til Jákup á Borg, sum sendi innfyri. Pacek misti bóltin til John, sum smekkaði til úr spískum vinkli til endaliga úrslitið 5-1.

At John Petersen hevur funnið stórspælið framaftur verður óivað avgerandi fyri, um B36 kann vinna meistaraheitið aftur.

**Dysturin í tølum:**
*B36 – EB/Streymur 5-1 (3-0)*
1-0: John Petersen
2-0: Jens Kristian Hansen
3-0: Heðin á Lakjuni
3-1: Sorin Anghel
4-1: Magni á Lakjuni
5-1: John Petersen

Dómari: Eiler Rasmussen (Skáli)

**B36:** Tróndur Vatnhamar – Arnbjørn Danielsen, Pól Thorsteinsson, Bjarni Prior (Niels Joensen) – Jan Guttesen, Klæmint Matras, Jens Kristian Hansen, Jákup á Borg – Magni á Lakjuni (Heini í Skorini), Heðin á Lakjuni, John Petersen

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Ólavur Poulsen (Hallur Jacobsen), Andrzej Pacek, Knút Vesturtún, Esmar Eiðisgarð – Andreas J. Dahl (Vinjard Dam), Alfred Jacobsen, Ronnie Samuelsen, Eyðfinnur Joensen – Sorin Anghel, Jón Sigurð Gleðisheygg

GÍ-KÍ 1-0 (1-0):

# GÍ stríddist og vann

**Botnliðið úr Gøtu fekk kærkomnan sigur ímóti KÍ, sum nú er næstniðast í 2. deild**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað kom bara eitt mál í dystinum, tá næstbesu liðini hjá GÍ og KÍ hittust í Sarpisgeði sunnudagin. Bæði liðini liggja í skeiva endanum av 2. deild, og serliga fyri GÍ, sum var og er aftast, hevði tað týnding at vinna dystin ímóti einum av liðunum, sum teir ætla sær upp um.

Tað eydnaðist eisini gøtumonnum at vinna, og tað gjørdu teir við einasta málinum, sum kom í dystinum. Tað vóru spældir einir 35 minuttir, tá eitt gott innleg úr vinstru síðu endaði hjá vongverjanum, Johnreid Dalheim. Hann smekkaði til fyrstu ferð, og bólturin streyk flatt í málið við handara stólpa. Eitt gott mál.

KÍ hevði nógv spæl, og teir komu eisini til onkrar kjansir. Verjumaðurin, Poul Juul Vilhelmsen, hevði gyltan møguleika eftir ein lítlan hálva tíma, men hann sendi innleggið upp um málið. KÍ-málverjin bjargaði eisini væl, tá brasilsi álopsspælarin hjá GÍ kom í góða støðu.

Eilev Sivertsen, sum var við hjá KÍ fyri fyrstu ferð í ár, hevði góða frísparksroynd. Bólturin rakti ein GÍ-fót og streyk fram við øðrum GÍ-stólpanum.

### KÍ nógv spæl

Í seinna hálvleiki hevði KÍ leikliga yvirvág, men gøtumenn royndu at gera skjótt av, tá teir fóru í álop. Hesum spurdust onkrar vandamiklar støður burturúr, men tað vóru fáir upplagdir kjansir.

Magni Jarnskor var við á GÍ-liðnum, og hann dugdi væl at stýra spælinum. Magni gjørdi ikki so nógv hóvasták burturúr, men hann vann nógvar bóltar og spældi teir skilagott frá sær allatíðina.

KÍ royndi at bróta ígjøgnum í síðunum, har serliga Torleif Eyðun Petersen ofta kom ígjøgnum, men støðurnar gjørdust sjáldan veruliga vandamiklar. Olgar Danielsen hevði góða skotroynd, men GÍ-málverjin bjargaði heilt uppi við tvørstongina. Í øðrum støðum kláraðu GÍ-verjuspælararnir at blokera skotroyndunum frá KÍ'arunum.

Seinastu minuttirnar av dystinum spældi GÍ við 10 monnum, eftir at aftasti maður, Anton Skoradal, var vístur av vøllinum. Hann fekk sítt næsta gula kort fyri at brúka hondina. Men tað spurdist ikki meira burtur úr álopsspælinum hjá KÍ, og í hinum endanum var tað um reppið, at GÍ-spælararnir komu ígjøgnum í onkrum støðum.

**GÍ-KÍ 1-0 (1-0)**
1-0: Johnreid Dalheim



# Julian fekk góða byrjan


*Julian Johnsson vann í fyrsta landskappingardysti sínum fyri Hull City í ensku 3. deild*

**Julian Johnsson spældi allan dystin á miðvøllinum og fekk gult kort, tá Hull vann 3-1 í fyrsta landskappingardystinum í nýggja kappingarárinum**

ONGLAND
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin spældi landsliðsspælarin, Julian Johnsson, fyrsta dyst sín fyri enska 3. deildarfelagið, Hull City.

Dysturin var spældur á útivølli í Exeter, og hóast Julian og teir komu aftur um 1-0 tíðliga í dystinum, eydnaðist teimum at vinna ein tryggan sigur.

Julian Johnsson var settur at spæla á sentrala miðvøllinum, og har spældi hann allan dystin. Tá góðir 20 minuttir vóru spældir, fekk Julian gult kort, og han var einasti av Hull-spælarunum sum fekk eina ostaflís.

Hull javnaði leiðsluna hjá Exeter áðrenn hálvleikssteðgin, og í seinna hálvleiki var Hull ruddiliga við yvirlutan og skoraði tvær ferðir afturat.

### Harður miðvøllur

Undan fyrsta dystinum í kappingarárinum hugleiddi heimasíðan hjá Hull City um, hvussu venjarin, Brian Little, fór at seta liðið til dystin.

Little hevur nógvar spælarar at velja ímillum, og eisini á sentrala miðvøllinum, har Julian er ein av spælarunum, eru nógvir at velja ímillum.

Heimasíðan hjá Hull helt tó, at Brian Little fór at velja Julian Johnsson og Mark Greaves til miðvøllinum, og soleiðis var eisini.

Heimasíðan vísti á, at spælararnir hjá Exeter eru kropsliga sterkir, og tað fór venjarin at hugsa um, tá hann setti liðið. Og tað ber illa til at finna ein harðari mivøll enn Julian og Greaves í ensku 3. deild, helt heimasíðan fyri.

## Støðan, danska superligan

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Brøndby | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 11 | 1 | 10 | 9 |
| 2AaB | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 3Lyngby | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 5 | 2 | 3 | 8 |
| 4FCK | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 7 |
| 5Vejle | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 7 | 7 | 0 | 5 |
| 6Viborg | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 4 | 4 | 0 | 5 |
| 7FCM | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 5 |
| 8AB | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 6 | -1 | 4 |
| 9Esbjerg | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 10OB | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 11Silkeborg | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 2 | 7 | -5 | 2 |
| 12AGF | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 1 | 9 | -8 | 1 |

## Støðan, danska 1. deild

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Frem | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 6 |
| 2Farum | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 3Brønshøj | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 4HFK Sønderj. | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 5B93 | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 6Herfølge | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 7AC Horsens | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 8Køge | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 9Hvidovre | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 10B 1909 | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 11FC Aarhus | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 12Randers F. | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 13Skive | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 14Fredericia | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 0 |
| 15B 1913 | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 16Kolding IF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 5 | -4 | 0 |

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 18 | 11 | - | 5 | - | 2 | 50 | 21 | 29 | 38 |
| 2 | Lillestrøm | 17 | 11 | - | 3 | - | 3 | 44 | 23 | 21 | 36 |
| 3 | Viking | 18 | 10 | - | 5 | - | 3 | 34 | 21 | 13 | 35 |
| 4 | Brann | 18 | 10 | - | 4 | - | 4 | 50 | 29 | 21 | 34 |
| 5 | Stabæk | 18 | 11 | - | 1 | - | 6 | 34 | 26 | 8 | 34 |
| 6 | Odd. Grenl. | 17 | 9 | - | 4 | - | 4 | 35 | 22 | 13 | 31 |
| 7 | Molde | 18 | 8 | - | 4 | - | 6 | 36 | 31 | 5 | 28 |
| 8 | Sogndal | 18 | 6 | - | 4 | - | 8 | 29 | 41 | -12 | 22 |
| 9 | Moss | 18 | 6 | - | 1 | - | 11 | 22 | 35 | -13 | 19 |
| 10 | Bodø/Glimt | 18 | 4 | - | 6 | - | 8 | 27 | 34 | -7 | 18 |
| 11 | Lyn | 18 | 3 | - | 7 | - | 8 | 27 | 33 | -6 | 16 |
| 12 | Strømgodset | 18 | 3 | - | 6 | - | 9 | 31 | 53 | -22 | 15 |
| 13 | Tromsø | 18 | 4 | - | 0 | - | 14 | 14 | 37 | -23 | 12 |
| 14 | Bryne | 18 | 3 | - | 2 | - | 13 | 10 | 17 | -7 | 11 |





